**Munnligur fyrispurningur**

**til Kaj Leo Holm Johannsen, løgmann**

**um løgfrøðiliga eftirkanning av lógaruppskotum og frágreiðing**

1. Hvør løgfrøðilig eftirkanning er av lógaruppskotum frá landsstýrinum í dag ?
2. Hvat ger løgmaður fyri at styrkja løgfrøðiligu eftirkanningina og góðskuna av lógararbeiðinum hjá landsstýrinum ?
3. Nær fær Løgtingsins Fíggjarnevnd lovaðu frágreiðingina um, hvussu løgfrøðilig eftirkanning av lógaruppskotum fer fram í landsstýrinum í dag ?
4. Hvat meinar løgmaður við, tá hann í undanfarnu viku alment staðfestið, at "politikkur hevur onki við løgfrøði at gera..." ?

**Viðmerking**
Fyri at tryggja, at tey lógaruppskot, ið landsstýrið leggur fyri Løgtingið at taka støðu til, eru smíðað so væl sum møguligt m.a. so hesi veruliga røkka tí endamáli, ið tey eru ætlað at røkka, varð arbeiðið í landsstýrinum fyrr skipað soleiðis, at øll lógaruppskot úr øllum aðalráðum skuldu til løgfrøðiliga eftirkanning á lógardeildini, áðrenn hesi vórðu latin Løgtinginum. Hetta er eisini vanlig mannagongad í grannalondum okkara.

Henda løgfrøðiliga eftirkanning er nú spard burtur, og úrslitið hevur verið hareftir.

Fíggjarnevndin hevur eisini umrøtt málið saman við løgmanni, og í samband við viðgerð av fíggjarlógini fyri 2014, bað løgmaður um, at leggja eina frágreiðing fyri Løgtingsins Fíggjarnevnd um, hvussu løgfrøðiliga eftirkanningin av lógaruppskotum í dag er skipað. Enn hevur onki verið at frætt um hesa frágreiðing.

Seinasta fráboðan løgmans viðvíkjandi løgfrøðini var, tá hann í undanfarnu viku fráboðaði, at "politikkur hevur onki við løgfrøði at gera...". Hetta var ein merkisverd útsøgn frá landsins ovasta leiðara. Ein fráboðan, ið krevur nærri frágreiðing.

Fyri at fáa lýst, hvat gjørt verður fyri, at endurreisa løgfrøðiligu eftirkanningina av lógaruppskotum, og staðfest nær frágreiðing verður latin Løgtingsins Fíggjarnevnd um hetta, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 28. januar 2014

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi